# Jógvan á Lakjuni spyr Annitu um filmseftirlit

**- Er ætlanin at seta nakað í staðin, tá ið Filmseftirlitið verður avtikið, spyr Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, sum heldur, at hetta er eitt ógvuliga keðiligt signal at senda út**

FYRISPURNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Annita á Fríðriksmørk, landsstýrismaður, ætlar at avtaka lógina um Filmseftirlit…*



*… eg haldi, at hetta er eitt álvarsligt stig og eitt ógvuliga keðiligt signal at senda út, sigur Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður*

Løgtingsmaðurin, Jógvan á Lakjuni, hevur sett Annitu á Fríðriksmørk, landsstýrismanni, ein fyrispurning um lógina um filmseftirlit.

Løgtingsmaðurin spyr, hvør orsøkin er til, at lóg nr. 92 frá 4. oktober 1984 um filmseftirlit við seinni broytingum skal takast av. Hann vil eisini hava at vita, um ætlanin er at seta nakað í staðin fyri hesa lóg.

Í viðmerkingum sínum sigur Jógvan, at Filmseftirlitið er rættiliga gamalt og varð, áðrenn núgaldandi lóg kom í gildi, skipað eftir lóg frá 1938 og kunngerðum í hesum sambandi.

- Henda skipan fevndi sum vera man bert um biograffilmar.

Løgtingsmaðurin vísir á, at í 1984 varð nýggj lóg um filmseftirlit samtykt, og nú vórðu videofilmar eisini fevndir av filmseftirlitinum.

### Neyðugt eftirlit

- Eingin ivi kann vera um, at tað er alneyðugt at hava eftirlit við, hvørjir filmar verða vístir í biografum í Føroyum - og ikki minni, hvørjir videofilmar verða seldir ella leigaðir út. Eitt filmseftirlit gevur serstakliga foreldrum eina trygd fyri, at teir filmar, sum tey ungu fara til, keypa ella leiga, hava verið gjøgnum eitt filtur, har ein nevnd við skikkaðum fólki hevur góðkent og veitt trygd fyri, at innihaldið er borðbært.

Jógvan heldur tað tí vera ógvuliga løgið, at landsstýrismaðurin sambært fíggjarlógaruppskotinum fyrireikar uppskot um avtøku av lógini um filmseftirlit.

### Óheppið signal

- Eg veit ikki, hvørji argumentini eru fyri at avtaka Filmseftirlitið. Sjálvandi kann vera brúk fyri onkrum broytingum, men tær síggjast so ikki í fíggjaruppskotinum, sigur hann.

Hann heldur, at ætlaða avtøkan av Filmseftirlitinum er eitt álvarsligt stig at taka og eitt ógvuliga keðiligt signal at senda út.

- Tað hevði tí verið áhugavert at fingið at vitað, hvør veruliga orsøkin er til hetta uppskot, sigur løgtingsmaðurin, Jógvan á Lakjuni.

Løgtingið samtykti á tingfundi, 15. oktober, at Annita á Fríðriksmørk, landsstýrismaður, skal svara fyrispurninginum hjá løgtingsmanninum.

# Tey eru ófør at mála á Stíggi

**Á Verkhúsinum Stíggi í Saltangará eru tey rættiliga kreativ og tey, sum hava áhuga fyri listini og øðrum handverki hjá brúkarunum, kunnu altíð støkka inn á gólvið og síggja ella keypa lutir, sum brúkararnir gera**

STÍGGJUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ein av málningunum hjá Ann-Mari í Puntabyrgi, er av Føroya Banka í Saltangará. Tá ið hon spurdi, um vit kundu siga, hvaðani myndin er, gittu vit plett – og fegin varð hon!*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Málningalistin hjá brúkarunum á Stíggi hevur fingið eitt rættiligt skump seinastu tíðina, og tað er ikki sørt, at einstaklingar og kommunur vilja keypa tað, sum hesi fólkini gera.

### Seldu 50 av 90

Á framsýningini í Ribarhúsi í Fuglafirði í august høvdu brúkarar á Stíggi einar 90 myndir við sær. Av hesum vórðu einar 50 myndir seldar.

Í fyrsta lagi eru tað tey avvarðandi sum keypa, men onnur hava so sanniliga eisini ligið fram við og ognað sær nakrar myndir.

Á Stíggi siga tey, at serliga Nes kommuna og Runavíkar kommuna keyptu fleiri málningar á hesi framsýningini.

Málningarnir, sum eru í dýrara endanum, kosta uppí einar 600 krónur, meðan teir í bíligara endanum kosta millum 100 og 200 krónur.

### Framsýning

Á Stíggi hongur ein rættilig framsýning uppi við málningum, sum brúkarar hava gjørt. Yvir hvørjari »samling«, er navnið á tí, ið teknað ella málað hevur.

Kendasti listamaðurin, sum eigur málningar, ið hanga á Stíggi, man vera Magni Mikkelsen, sum gjørdist ársins myndlistamaður, tá ið Javni skipaði fyri hesi kapping.

Á Stíggi hanga nógvar vakrar myndir. Summar abstraktar og aðrar, sum ímynda landsløg, bygdaløg, skip, bátar og virkir.

### Plettskot

Tá ið Sosialurin í síðstu viku vitjaði á Stíggi, varð spurt, um vit kundu siga, hvaðani myndin, sum vit prenta á hesi síðuni, er.

- Skal eg svara beinanvegin, sigi eg, at hetta er Føroya Banki í Saltangará! Jú, hetta var eitt plettskot!

Fegin var hon, ið málað hevði, at eg kundi siga, hvør myndin var.

Í hesum førinum var tað brúkarin, Ann-Mari í Puntabyrgi, sum hevði málað.

Á Verkhúsinum Stíggi í Saltangará eru 19 brúkarar, og starvsfólkini eru 6 í tali, harav tvey arbeiða hálva tíð.

Opið er hvønn yrkadag frá kl. 8.30-15.30.



UTTAN ÚR HEIMI

# Russar ætlaðu at myrða Vladimir Putin

*Ein fyrrverandi yvirmaður í KGB hevði lagt eina ætlan um at myrða Vladimir Putin, tá hann var á uttanlandsferð*



**Bretska løgreglan hevur tikið ein fyrrverandi yvirmann í KGB og ein annan russara. Hildið verður, at teir ætlaðu at beina fyri russiska forsetanum.**

MORÐÆTLAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Scotland Yard tók teir báðar menninar fyri hálvari aðru viku síðani, eftir at ein fyrrverandi russiskur fregnartænastumaður hevði kunnað løgregluna um, hvat menninir ætlaðu.

Sambørt Sunday Times sótu teir báðir menninir í einum av teimum tryggastu fongslunum í Bretlandi, til teir seinasta fríggjadag vórðu settir umborð í eitt flogfar, sum fór til Moskva.

Sambært blaðnum ætlaðu teir báðir menninir at myrða Vladimir Putin, meðan hann var á vitjan uttanlands. Fyrrverandi russiski fregnartænastumaðurin, sum avdúkaði ætlanina, flýddi sjálvur úr Russlandi til Bretlands fyri trimum árum síðani. Hann hevur greitt bretsku løgregluni frá, at hinir báðir menninir ringdu til hansara, og at hann eisini hitti teir einaferð uttan fyri eina matstovu í London. Tá avdúkaði annar av monnunum, sum er ein fyrrverandi majorur í KGB, at teir ætlaðu at myrða Putin. Orsøkina segði hann vera, at forsetin mátti ruddast av vegnum, áðrenn hann koyrdi Russland á húsagang.

Sambært Sunday Times visti bretska fregnartænastan, MI5, um morðætlanina.

# Blair er strongdur

**Um vikuskiftið noyddist bretski forsætisráðharrin á sjúkrahús við hjartatrupulleikum. Maðurin er strongdur, siga politiskir eygleiðarar í London.**

STRONGD
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað kom ikki óvart á politiskar eygleiðarar í London, at Tony Blair, forsætisráðharri, mátti á sjúkrahús sunnudagin, tí hann hevði fingið trupulleikar við hjartanum. Har kundu læknarnir skjótt staðfesta, at talan var ikki um nakrar lívshóttandi trupulleikar, og Blair slapp eisini heimaftur eftirt stutta viðgerð. Samstundis fekk hann boð um at binda frið ein dag.

Peter Stothard, sum hevur skrivað ein bók um Tony Blair og lut hansara í krígnum í Irak, sigur, at tað kom als ikki óvart á seg, at forsætisráðharrin fekk trupulleikar við hjartanum.

- Hann hevur eitt tað mest tyngjandi arbeiðið, eg veit um. Einki kann samanberast við at fáa landið burtur úr einum kríggi, sum fólkið er ímóti, sigur Peter Stothard. Hann heldur, at Blair eigur at taka tilburðin sunnudagin sum eina ávaring.

Hetta er fyrstu ferð, at Tony Blair hevur havt hjartatrupulleikar, síðani hann gjørdist forsætisráðharri í 1997. Hann ber orð fyri at liva eitt sunt lív, hann er javnan úti og rennur og spælir eisini tennis. Men kríggið í Irak hevur kravt nógv av honum. Eitt er, at fólkið var ímóti krígnum, men tað hevur eisini kostað 50 bretskum hermonnum lívið, og oman á tað kom sjálvmorðið hjá vápnaeftirlitsmanninum David Kelly.

## Menna fiski- og alivinnuna

Myndugleikarnir í Saudiarabia hava sett sær fyri at menna landsins fiskivinnu, og teir ætla eisini at gera íløgur í alivinnuna. Tað fekk ein donsk sendinevnd, sum júst hevur vitjað landið, at vita.

Saudiarabar fiska í Persiska Flógvanum, og teir hava eisini nakað av ídnaðarfiskiskapi í Reyðahavinum. Teir ætla at gera íløgur í báðar vinnurnar, men hava samstundis sett sær fyri at gera meiri burtur úr alivinnu. Eitt nú er eftirspurningurin eftir rækjum úr heitum sjógvi vaksin nógv, og tað ætla saudiarabar at fáa gagn av.

Donsku umboðini, sum vóru í Saudiarabia, halda, at donsk ídnaðarvirkir, sum gera útgerð til fiski- og alivinnu, kunnu fáa nógv burtur úr saudiarabiska marknaðinum. Danska verksmiðjan Carnitech hevur longu bygt eitt stórt nútímans rækjuvirki í landinum.

## Fangi doyði av harðskapi

Átta amerikanskir hermenn og yvirmenn eru undir illgruna fyri at hava verið einum irakskum krígsfanga at bana, skrivar franska tíðindastovan AFP.

Herfyri frættist, at ein 52 ára gamal irakskur maður varð funnin deyður á amerikonsku herstøðini uttan fyri býin Nasirya í Irak í summar, men amerikanska herleiðslan vil ikki siga, hvørt illgrunin hevur samband við hendan mannin, ella um talan er um ein annan krígsfanga. Í hvussu er veit AFP at siga, at ein serlig kanningarnevnd hevur kannað málið síðani einaferð í summar.

Keldur í amerikanska herinum siga, at teir átta hermenninir eru ikki í Irak longur, men á einari herstøð í Kalifornia. Tríggir av teimum átta eru yvirmenn í herinum, og teir kunnu vænta at koma fyri ein hernaðardómstól. Verða teir funnir sekir, kunnu teir fáa harða revsing.

## Stórur áhugi fyri djúpa vatninum

Um stutta tíð fara teir norsku myndugleikarnir at bjóða oljufeløgunum loyvi at leita eftir olju og gassi á nýggjum leiðum, og longu nú er greitt, at áhugin er serliga stórur fyri leiðum á djúpum vatni.

Norsk Hydro, Statoil og Shell siga, at tey ætla sær at liggja framvið, tá tað 18. útbjóðingarumfarið verður, og at tey hava serliga áhuga í at fáa leitingarøki á djúpum vatni úti fyri Miðnoregi. Statoil og Shell ætla sær at søkja um fleiri leitingarloyvi í felag, og kunningarstjórin hjá Statoil, Kristofer Hetland, sigur við NTB, at felagið fer at raðfesta Norskahavið og norska landgrunnin fremst tey næstu nógvu árini.

Eisini í Norsk Hydro verður sagt, at Norskahavið fer at hava ein týðandi lut í virkseminum hjá felagnum í komandi árum, og at felagið serliga fer at leggja seg eftir leiðunum á djúpum vatni.

## Stuðla sjálvmorðsatsóknum

Ein meiningakanning í teimum palestinsku økjunum vísir, at ein stórur meiriluti av palestinska fólkinum taka undir við at nýta sjálvmorðsatsóknir ímóti ísraelsmonnum.

Kanningin varð gjørd beint aftan á sjálvmorðsatsóknina at einari matstovu í býnum Haifa fyri fjúrtan døgum síðani, tá 21 fólk lótu lív. 65 prosent av teimum spurdu svaraðu, at tey tóku undir við atsóknini, og heili 89 prosent søgdu, at tað er rætt at nýta sjálvmorðsatsóknir ímóti ísraelska herinum og jødiskum niðursetubygdum. Samstundis siga 95 prosent av teimum spurdu, at tey hava ikki álit á USA sum semingslandi í Miðeystri.

Í kanningini vórðu palestinararnir eisini spurdir, hvat teir halda um Yasser Arafat, forseta. Her svaraðu 50 prosent, at tey høvdu atkvøtt fyri Arafat, var forsetaval nú. Fyri einum ári síðani søgdu 35 prosent av palestinunum tað sama.